# Vandamikið fríggjarabræv



*Nógvir føroyskir internetbrúkarar vóru í gjár álopnir av herviligari telduvirus*

EYÐUN KLAKSTEIN

Nógvir føroyskir internetbrúkarar vóru í gjár álopnir av eini heviligari telduvirus, sum hevur gjørt um seg kring allan heimin.

Talan er um eitt teldubræv, sum kallast »I love you«, og nei, tað er ikki eitt fríggjarabræv frá unnustuni ella tí ókenda fjepparanum.

Tað er ein telduvirus, sum strikar heimasíður og skrivar út yvir allar jpeg og mp3 fílar. Harafturat sendir teldubrævið seg sjálvt víðari til øll, sum standa í adressulistanum í postskipanini.

Hetta ger, at virusið ferðast skjótt á internetinum, og tað gjørdi tað eisini hjá føroyskum internetbrúkarum í gjár.

### Strika brævið

Sosialurin og nógvar aðrar fyritøkur og einstaklingar fingu teldubrævið sendandi, og tey sum hava latið fylgisbrævið upp, hava fingið virusina í telduna. Eingin vandi er tó á ferð, um fylgisskjalið ikki verður latið upp, men verður strikað. Sjálvt teldubrævið kann ikki smitta telduna, verður sagt.

Tað er vanligt, at telduvirus ferðast á internetinum, men av og á gera serlig virus um seg, og hesi kunnu gera skaða í teldunum.

Áðrenn evstamark hjá okkum høvdu fyritøkurnar, sum gera verjuskipanir móti virusi, onga skipan, sum kundi steðga »I love you« virusinum, men tað tey væntaðu, at tey høvdu ment eina skipan seinnapartin í gjár.

Hóast virusið ger seg inn á teldu og postskipanina, so fer hon tó ikki í postkassan og oyðileggur rútakbrævbjálvar...




*Mikkjal Sørensen, stjóri í Suðuroyar Sparikassa, og Jóannes S. Hansen, leiðari av deildini í Havn*

# Hálva aðru millión í avlopi í fjør

Suðuroyar Sparikassi hevði hálva aðru millión í avlopi áðrenn skatt í fjør. Í 1998 var avlopið næstan tríggjar milliónir krónur.

Rentuinntøkurnar hjá sparikassanum vuksu úr 8,7 milliónum upp í 10,7 milliónir.

Eginognin hjá Suðuroyar Sparikassa var við árslok í fjør 31,8 milliónir krónur afturímóti 30,6 milliónum við árslok í 1998.

Suðuroyar Sparikassi lat í fjør upp eina deild í Havn, og sambært sparikassanum er virksemi í hesi deildini vaksandi.

**ek**




*Klaksvíkar Hornorkestur hevur týðandi leiklut á Norðoyastevnuni. Og orkestrið spælir til nógv onnur tiltøk í Klaksvík og aðrastaðni. Mynd: John Johannessen*

# Klaksvíkar Hornorkestur heldur 50 ára dagin

*Í kvøld hevur Klaksvíkar Hornorkestur føðingardagskonsert í Ósaskúlanum, og í morgin letur myndaframsýning um søgu felagsins upp*

EYÐUN KLAKSTEIN

Í dag verður Klaksvíkar Hornorkestur fimti ár, og merkisdagurin verður hildin um vikuskiftið.

Í kvøld klokkan 20.00 verður ein serlig konsert í Ósaskúlanum.

– Vit gera eitt sindur eyka burtur úr. Konsertin verður afturlítandi og vit fara at spæla okkurt frá øllum tíðarskeiðunum hjá Hornorkestrinum, sigur Magnus Arge, formaður í Klaksvíkar Hornorkestri.

Eitt lag, sum verður við á konsertini í kvøld, varð spælt, tá Klaksvíkar Hornorkestur hevði sína fyrstu konsert í 1951.

Harafturat verða onkrir serliga gávulutir at fáa til keyps.

Eftir konsertina í kvøld fer Klaksvíkar Hornorkestur at hava veitslu í Skálanum.

Í morgin klokkan 14.00 ein myndaframsýning upp í hølunum hjá hornorkestrinum. Hon er opin til kl. 18.00.

Framsýningin fer at vísa ymiskt úr søguni hjá felagnum, og hon verður eisini opin í morgin frá kl. 14.00 til 18.00.

Í løtuni spæla 25 fólk við Klaksvíkar Hornorkestri, tá tað er fullmannað. Øll ljóðførini hjá orkestrinum vóru skift út fyri trimum árum síðani.

Sharon Fisher er venjari hjá Klaksvíkar Hornorkestri.

Sámal Christiansen og Otto Samuelsen hava verið við í orkestrinum øll 50 árini.

# Blái Krossur Føroya landsstevnu

*Nógv áhugavert og spennandi verður á skránni á landsstevnuni hjá Bláa Krossi Føroya, sum verður um vikuskiftið — bæði til børn, ung og vaksin*

"Sæl eru tey miskunnsomu" er slagorðið fyri landsstevnuna hjá Bláa Krossi í ár, sum verður hildin komandi vikuskiftið 6. - 7. mai á Strondum. Nógv áhugavert og spennandi verður á skránni, bæði til børn, ung og vaksin og Blái Krossur leggur dent á, at landsstevnan er almenn, so øll eru hjartaliga vælkomin, bæði blákrosslimir og ikki blákrosslimir.

### Vitjan úr Danmark

Landsstevnan byrjar leygarmorgunin 6. mai kl. 11.00 við fyrilestri í missiónshúsinum, har Søren Boe frá Bláa Krossi í Danmark fer at tosað um evnið: *Blákrosstilboð til tey, ið hava tað ringt og ongan góðan eiga.* Eftir døgurða kl. 14.00 hevur aðalskrivarin Ásbjørn Jacobsen hugleiðingar um árið, ið fór og um framtíðina. Kl. 14.30 er eykaaðalfundur á skránni, har uppskot verður lagt fram um at broyta limagjaldið.

### Helena Dam á Neystabø vitjar

Leygardagin kl. 16.00 heldur Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í almanna og heilsumálum, áhugaverdan fyrilestur um evnið: *Hvat vantar samfelagið av einum hjálparfelagsskapi sum Bláa Krossi?* Hesin fyrilestur verður í skúlanum. Seinni um kvøldið kl. 19.30 verður annar áhugaverdur fyrilestur hildin í skúlanum. Tá fer deildarleiðarin á kriminalforsorgini, Karin Kjølbro, at tosað um evnið: *Rúsdrekka og kriminalitetur*. Kl. 21.00 skipar BKU (Blákrossungdómur) fyri ungdómsmøti, har m.a. Gimmi Olsen úr Klaksvík talar og ungdómskór av Strondum syngur.

### Hugnalig samvera

Sunnumorgunin kl. 11.00 verður gudstænasta í Sjóvar kirkju. Kl. 14.00 verður familjumøti í skúlanum, har Frits Thomsen talar og barnakór av Strondum syngur. Kl. 16.30 hevur Uni Næs, prestur bíbliutíma, har evnið er: *Geri ikki mannamun í næstrakærleikanum.* Landsstevnan 2000 endar sunnukvøldið kl. 19.00 við hugnaligari samveru í missiónshúsinum og skráin er bæði fjølbroytt og spennandi: Heri Tróndheim av Argjum talar um evnið: *Sæl eru tey miskunnsomu*. Stutt kut um fjølbroytta virksemið hjá Bláa Krossi verða framløgd. Fyrrverandi misnýtarar siga frá lívið sínum. Sangur verður við Hanus og Mariu Poulsen úr Leirvík og við Tofta streingjakóri og landsnevndarformaðurin, Sverri Steinhólm endar.

### Máltíðir og barnaansing

Neyðugt er at tekna seg á Blákrossskrivstovuni tlf. 44 93 43 um ein ynskir døgurða ella nátturða. Um fólk ynskja tað, er eisini møguleiki at fáa innivist hjá privatfólki. Meðan tiltøk eru fyri vaksin, verður skipað fyri barnaansing við ymiskum virksemi, undirvísing, ítrivi o .ø.



# Langtíðarfíggjarlóg fyri fólkaskúlan

*Tørvurin verður lýstur og og metingar gjørdar um, hvussu lógin verður umsitin best, so at allir tættir fáast at virka á skúlunum yvir eitt áramál við kunngerðum og rundskrivum, sigur Høgni Hoydal m.a. í svari til fyrispurning*

ÓLAVUR Í BEITI

Tað var Katrin Dahl Jakobsen sum undan verkfallinum setti mentamálaráðharranum 8 spurningar í fyrispurningi, og herfyri svaraði Høgni Hoydal fyrispurninginum, sum upprunaliga var settur Signari á Brúnni. Síðan er so eisini hent, at verkfallið hjá sáttmálasettu lærarunum er av.

Í fyrsta spurningi vil Katrin Dahl Jacobsen hava at vita, um landsstýrismaðurin heldur tað vera rætt og hóskiligt, at lógarásettar uppgávur í fólkaskúlanum verða gjørdar upp sum partur av lønar- og sáttmálasamráðing?

### Gjøgnumlýsing

Og Høgni Hoydal svarar, at hann hevur tikið stig til at gera eina gjøgnumlýsing av fólkaskúlalógina umsitingarliga og gjørt eina ætlan fyri, hvussu tættirnir í nýggju fólkaskúlalógin kunnu fáast at virka til fulnar. Hetta ætlar hann sær at gera í neyvum samskifti við Føroya Lærarafelag, skúlaleiðslur, skúlanevndir, og kommunur.

– Sjálvsagt eiga veruligu starvsviðurskiftini, arbeiðstíðin og arbeiðsuppgávurnar at vera lýstar til fulnar. Tað er grundarlag fyri at gera rættvísar og nøktandi sáttmálar. Hetta hevur helst vantað undir gomlu fólkaskúlalógini og nú eisini undir teirri nýggju. Ein arbeiðsbólkur við umboðum frá øllum pørtum skuldi havt verið liðugur at lýsa hetta økið, áðrenn sáttmálin fór úr gildi í ár, men hetta eydnaðist tíverri ikki. Men tað átti ikki at verið so trupult at gjørt hetta, um partarnir høvdu sitið við samráðingarborðið, og Undirvísingar- og Mentamálastýrið vil gera alt fyri at fáa hetta lýst í sátt og semju, sigur Høgni Hoydal.

Viðvíkjandi spurninginum um landsstýrismaðurin er nøgdur við, at lógarábyrgdarøki hansara stendur og fellur við, hvussu avvarandi fakfelag hepnast í eini lønarsamráðing, svarar Høgni Hoydal, at hann er ikki nøgdur við ta gongd og avleiðingar, sum lønarsamráðingarnar hava fingið. Gongd og avleiðingar standast m.a. av, at lógarásettu uppgávurnar og kostnaður av eini løgtingslóg sum heild eru tengdar upp í lønarsamráðingarnar. Fremsta mál landsstýrismansins er at tryggja, at fólkaskúlin virkar til fulnar fyri tey sum starvast har og varða av honum, og at næmingar fáa ta undirvísing, teir hava krav uppá.

### Skiljast frá

Og til spurningin, um landsstýrismaðurin heldur tað kann virka niðurbrótandi fyri fakfelagsarbeiði, tá ið tað skal stríðast fyri at útfylla eina lóg, sum tingið hevur samtykt, sigur Høgni Hoydal í svarinum, at tað er sera fremjandi, at eitt yrkisfelag ger vart við seg, tá ið talan er um at fáa karmarnar í eini lóg til veruligt innihald. Føroya Lærarafelag hevur frá fyrsta degi virkað fyri fólkaskúlan sum heild, og tað eigur felagið stóran heiður fyri.

Men tað at fylla lógina út, at umsita lógina, tryggja neyðugt fíggjarligt grundarlag, og hava ábyrgd fyri, at hon virkar, eigur ikki at verða tengt upp í sáttmálasamráðingar. Minnast má til, at landsstýrið er arbeiðsgevari hjá teimum alment settu – ikki Løgtingið. Løgtingið er arbeiðsgevari hjá landsstýrinum og skal halda eftirlit við, at landsstýrið útinnir lógirnar á fullgóðan hátt.

### 10 mió. árlig hækking

Viðvíkjandi spurninginum at fara aftur til gomlu lógina, um nýggja ikki virkar, sigur Høgni Hoydal, at fólkaskúlalógini verður lív lagað í einum mennandi samfelagi. Tá núverandi ósemja er loyst, kann øll orka fara til at gera føroyska fólkaskúlan til eitt fyridømi um nútímans undirvísing og útbúgving fyri øll í samfelagnum – uttan mun til ymisk evni, sosiala støðu, trúgv ella bústað í landinum. Fólkaskúlalógin er ætlað sum ein karmur um fólkaskúlans virksemið. Øll eiga vit at gera okkara til at fylla upp í karmarnar, men landsstýrið og løgting hava ábyrgdina og skulu tryggja, at karmarnir eru í lagi. Tað krevur eina langtíðarætlan og gott samskifti millum allar partar.

Og viðvíkjandi spurninginum, um mentamálaráðharrin ætlar at koma í tingið við umbøn um neyðugu játtanina, sigur Høgni Hoydal, at hann ætlar sjálvsagt út frá metingum um tørv og neyðugum raðfestingum at gera uppskot á komandi fíggjarlógum og at gera langtíðarfíggjarlóg fyri fólkaskúlan, sum tingið verður at taka støðu til.

– Annars kann verða upplýst, at játtanin til fólkaskúlan á árligu løgtingsfíggjarlógunum, tey seinastu trý árini, er økt við uml. 10 mió. kr. í føstum prísum.



*Katrin Dahl Jakobsen, løgtingskvinna Javnaðarfloksins*



*Høgni Hoydal, landsstýrismaður í skúlamálum*

# Hendur og Hugflog 2000

*Søluframsýning fyri føroyskt listhandverk og heimavirking*

Í døgunum 21.-23. juli verður Ítróttarhøllin á Hálsi í Havn aftur karmur um stóru summarsølustevnuna Hendur og Hugflog, sum varð hildin fyrstu ferð í 1997.

Høvuðsdenturin verður lagdur á at fáa luttøku frá listhandverkarum, heimavirkisfólki og øðrum, ið fáast við líknandi ikki ídnaðarkenda framleiðslu.

Endamálið við sølustevnuni er at gera vart við føroyskt handaverk og at geva teimum, ið framleiða, møguleika fyri at hitta stórt tal av keyparum, og ikki minst at hitta aðrar framleiðarar, soleiðis at hin einstaki á henda hátt kann mennast í handaverkinum.

Roynt verður at menna samstarvið við grannalondini, og eitt úrslit av hesum er, at fýra føroyskt handverksfólk júst í hesum døgum hava luttikið á líknandi framsýning í Íslandi, og at vit í ár hava boðið handverkarum úr Íslandi og Hetlandi at luttaka á stevnuni.

Tað hevur stóran týdning fyri sølustevnuna, at hon er fjøltáttað og at hon hevur eitthvørt nýtt at bjóða á hvørjum ári og fyri handverksfólkið hevur tað tann týdning, at tey fáa samband við útlendskar starvsfelagar, soleiðis at tey á henda hátt eisini fáa íblástur uttanífrá.

Á sølustevnuni vera sýningar, har fólk virka. Eisini verða móta- og vørusýningar og onnur áhugaverd tiltøk.

Føroya Heimavirkisfelag og Menningarstovan fyrireika stevnuna.




**Nú** kann **PIZZA 67** sum nakað heilt nýtt bjóða øllum tykkum, ið eta á matstovu okkara ókeypis **breyðstengur** aftur við ella áðrenn matin, tá tit keypa pizza ella burgara. Hetta er sjálvandi eisini galdandi fyri øll tykkum, ið bíleggja mat og sjálvi avheinta hann...

***So minst til***: Næstu fer tú bíleggur pizza frá okkum og vit geva tær hesar **vælsmakkandi breyðstengurnar** afturvið, so er tað ikki tí, at vit hava tikið ímóti skeivum ordra - breyðstengurnur fylgja við, um tú etur tær ella ikki...

Tilboðið er galdandi til 1. juni 2000

Opið er:
Mán.-frí.: 12-14 og 17-24
Ley. og sun.: 14-24

til øll teirra, sum eta hjá okkum og teirra, ið sjálvi avheinta mat frá okkum...

PIZZA 67

Tinghúsvegur 8 • Tórshavn
TEL 35 67 67

petur & petur • 320870